# Kunngerðablaðið A

2009 Hefti 19

ISSN 0907-905X


Nr. 97

3. juli 2009

**Kunngerð**
**um**
**gjøld fyri aliloyvi**

Við heimild í § 20 í løgtingslóg nr. 83 frá 25. mai 2009 um aling av fiski v.m., verður ásett:

**§ 1.** Til tess at fáa og varðveita aliloyvi, verður rindað eitt árligt gjald upp á kr. 8.000.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann veita loyvishavarum við ikki-vinnuligum aliloyvum undantak at rinda gjaldið sbrt. stk. 1.

**§ 2.** Gjaldið fellur til gjaldingar, tá ið serligt uppkrav er móttikið.

**§ 3.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 96 frá 29. juni 2009.

Vinnumálaráðið, 3. juli 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

**Kunngerð um broyting í kunngerð um Føroyska Altjóða Skipaskrá**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 83 frá 19. mai 1992 um Føroyska Altjóða Skipaskrá, sum broytt við kunngerð nr. 47 frá 8. apríl 1998 verða gjørdar hesar broytingar:

Í § 7, stk. 4, 1. pkt. verður „Skjøl til skrásetingar verða latin inn millum kl. 10 og kl. 15 teir dagar, Skipaskrásetingin hevur opið“ broytt til „Skjøl til skrásetingar verða latin inn millum kl. 9.00 og 12.00 teir dagar, Skipaskrásetingin hevur opið“.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi tann 1. august 2009.

Vinnumálaráðið, 7. juli 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um frekvens (tíddar)- og avgreiðslugjøld á radiosamskiftisøkinum

### § 1

Í kunngerð nr. 70 frá 2. november 2004 um frekvens (tíddar)- og avgreiðslugjøld á radiosamskiftisøkinum verður aftaná § 2 sett:

„**§ 2 a.** Bjargingarfeløg og onnur áhugafeløg, sum virka innan tilbúgvingarøkið, eru undantikin øllum gjøldum, sum eftir hesari kunngerð standast av loyvi til nýtslu av frekvensi.“

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 14. juli 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

FØROYAPRENT

Hefti 19 • Nr. 97-99 • Útgivið tann 16. juli 2009